# Magnus Heinason - Túrfrágreiðing
# Yvirlitstrolingar. Túrur nr. 1932
# Videokanning. Túrur nr. 1933
# Tíðarskeið: 14/8-25/8 - 2019

**Fólk við frá Havstovuni:** Luis Ridao Cruz, Poul Vestergaard, Marit Pedersen, Fróði Skúvadal og Petur Steingrund.

**Ábyrgd:** Petur Steingrund.

**Endamál:** Hetta var seinni túrurin av yvirlitstrolingunum á Landgrunninum á heysti í ár. Høvuðsendamálið við túrinum var at fáa til vega tilfar, ið skal nýtast í stovnsmetingunum av toski, hýsu og upsa, t.e. veiða í vekt og í tali, longdarbýti, vektbýti, aldursbýti, kynsbýti og kynsbúning av nevndu sløgum. Umframt varð vekt, tal og longdarbýti skrásett fyri øll fiskasløg, ið vórðu veidd. Eisini vórðu magakanningar gjørdar av toski, hýsu og upsa, umframt av øðrum fiskasløgum. Hitin í sjónum varð máldur við miniloggarum. Eisini vórðu genetiskir prøvar tiknir av kjaftsvarta kongafiski, meðan eingin skøta (D. Batis) ella glýsufiskur varð fingin til slíkar prøvar.

**Reiðskapur:** 116 fóts kassatrol við 40 mm meskum í posanum. Steinham lemmar. Breitlar 60 og 120 m. Miniloggarar at máta temperatur. Kameraútgerð at filma botnin.

**Um túrin:** Fóru av Havnini hóskvøldið 15. august kl. 21:15. Vit byrjaðu suður-eystur av Suðuroyabanka og tóku støðir á Munkagrunninum. Gjørdu eitt legg í Vágahavið at taka støðir um vikuskiftið, tá fáir smábátar vóru á floti. Tóku støðir nærhendis Mykinesi, men har vóru línuskip og neyðugt var at fara suður á Munkagrunnin at taka tær støðir, sum restaðu í har. Tóku síðan tær írestandi støðirnar nærhendis Mykinesi. Tilsamans vórðu 71 hál tikin, og av teimum vóru øll góðkend. Hósdagin 22/8 fóru vit at filma havbotnin fyri millum annað at finna korallir. Tá ikki bar til at filma korallir, filmaðu vit støðir, har Magnus Heinason ger yvirlitstrolingar. Vit landaðu í Havn fríggjamorgunin 23. august og umvældu videoútgerðina. Fóru síðan útaftur og filmaðu havbotnin til sunnukvøldið. Veðrið var gott allan túrin.

**Prøvatøka:** Veiðan varð viðgjørd sambært kanningarætlanini og sýnishondbókini. Yvirlit yvir veiðu, nytrur og magar (Talva 1) er víst niðanfyri. Tal av nytrum var eftir ætlan fyri øll fiskasløgini tosk, hýsu og upsa.

**Nær eru prøvarnir upparbeiddir:** Túrurin var liðugt rættaður 23. august. Ynskiligt er, at nytrurnar skulu vera lisnar og innlagdar í databasu í seinasta lagi 15. oktober.

**Úrslit fyri túr 1930 og 1932 undir einum (200 hál, sí Mynd 1 og Mynd 2):** Eftir at toskurin kom fyri seg aftur í 2017, hevur nøgdin verið minkandi. Tann nógva hýsan og hvítingurin eru eisini í minking. Nakað tað sama varð fingið av upsa, meðan tað var nógv at fáa av reyðsprøku, havtasku og blálongu í mun til onnur ár. Magakanningarnar vístu, at tað var sera lítið til av nebbasild. Eisini var lítið etið av hvítingsbróðri, svartkjafti og krabbadýrum á botni. Í tráð við hetta vóru bæði toskur og hýsa rak í mun til onnur ár. Toskurin var líka illa fyri sum í 2003, sum annars var tað vánaligasta árið, síðan mátingarnar byrjaðu í 1996. Hetta er helst ein høvuðsorsøk til góða vinnuliga fiskiskapin eftir toski við línu. Tríggir merktir toskar vórðu fingnir aftur á túri 1930 og eingin á túri 1932.

**Talva 1**. Veiða, og nytrur (aldrar) og magar tikin á túri 1932, tilsamans 71 hál.

| FISKASLAG | KG | NYTRUR | MAGAR |
|---|---|---|---|
| HÝSA | 21050.51 | 464 | 127 |
| TOSKUR | 3908.055 | 456 | 132 |
| UPSI | 2618.760 | 428 | 95 |
| LÍTLI KONGAFISKUR | 2531.200 | | |
| SVARTKJAFTUR | 1410.147 | | |
| GULLLAKSUR | 1273.602 | | |
| HVÍTINGUR | 1152.596 | | |
| HVÍTINGSBRÓÐIR | 1005.578 | | |
| LONGA | 1003.738 | 38 | 2 |
| HAVMÚS | 898.103 | | |
| KNURRHANI | 560.914 | | |
| STÓRI KONGAFISKUR | 311.297 | | |
| REYÐSPRØKA | 233.088 | | |
| BLÁLONGA | 223.740 | 12 | 9 |
| TUNGA | 216.359 | | |
| HAVTASKA | 215.346 | | |
| TRANTKONGAFISKUR | 141.805 | | |
| SKRAMBUL | 120.322 | | |
| LÍTLABROSMA | 105.395 | | |
| SANDSPRØKA | 104.434 | | |
| BROSMA | 88.378 | 15 | |
| LÝRUR | 80.680 | 1 | 1 |
| KJAFTSVARTI KONGAFISKUR | 80.542 | | |
| SVARTKALVI | 54.999 | 5 | 4 |
| GAMAL FISKUR | 49.148 | | |
| SILVURMURTUR | 41.862 | | |
| KALVI | 40.750 | 1 | 1 |
| SEKSTÁKNUHÁVUR | 38.200 | | |
| TINDASKØTA | 37.014 | | |
| LÁLLA | 16.896 | | |
| MATHØGGUSLOKKUR | 16.695 | | |
| STREYMSILD | 15.222 | | |
| STEINBÍTUR | 14.523 | | |
| IGULKER | 14.092 | | |
| BÚKSVARTI HÁVUR | 13.879 | | |
| MAKRELUR | 12.182 | | |
| COLLETTS BÚKSVARTI HÁVUR | 11.267 | | |
| SJÓTRÆ PARAGORGIA ARBOREA | 9.325 | | |
| SILD | 7.910 | | |
| KJAFTSVARTI HÁVUR | 4.622 | | |

| | | | |
|---|---|---|---|
| LÝSINGUR | 3.960 | | |
| AGNHØGGUSLOKKUR | 3.877 | | |
| KORALL LOPHELIA PERTUSA | 3.615 | | |
| TRÆLSRASSUR HOLOTHUROIDEA | 3.398 | | |
| KLINGRUSKØTA | 2.012 | | |
| OSTUR GEODIA SP | 1.497 | | |
| PURPURIGULKER | 1.218 | | |
| GLASKVOYSA | 0.891 | | |
| REYÐI KNURRHANI | 0.765 | | |
| ØÐA | 0.725 | | |
| TASKUKRABBI | 0.630 | | |
| HVASSASPREK | 0.576 | | |
| ÚLVFISKUR | 0.485 | | |
| SJÓNOTA ACTINIARIA | 0.425 | | |
| MEDUSAHØVD | 0.340 | | |
| KROSSFISKUR ASTERIIDAE | 0.287 | | |
| HVALSPÝGGJ | 0.247 | | |
| GÁGGUKRABBI | 0.117 | | |
| PORIFERA | 0.096 | | |
| MURRIKRUTT | 0.084 | | |
| JÁKUPSSKEL(DEYÐ) | 0.083 | | |
| BRYNJUKRUTT | 0.029 | | |
| NEBBASILD | 0.004 | | |
| TILSAMANS | 39758.54 | 1420 | 371 |

**Mynd 1. Úrslitini niðanfyri eru fyri allar 200 støðirnar á føroyska landgrunninum (túr 1930 og 1932).**




Havtaska
KG per troltíma
0
1
2
3
4
5
6
1995
2000
2005
2010
2015
2020
Blálonga
KG per troltíma
0
1
2
3
4
5
6
7
1995
2000
2005
2010
2015
2020
Trantkongafiskur
KG per troltíma
0
2
4
6
8
10
12
1995
2000
2005
2010
2015
2020
Stóri kongafiskur
KG per troltíma
0
5
10
15
20
25
30
35
40
45
50
1995
2000
2005
2010
2015
2020


Hvítingsbróðir
KG per troltíma
0
20
40
60
80
100
120
1995
2000
2005
2010
2015
2020
Svartkjaftur
KG per troltíma
0
20
40
60
80
100
120
1995
2000
2005
2010
2015
2020

**Mynd 2. Nøgd av nebbasild í toskamagum í august og hvussu feitur toskur er. Nøgd av nebbasild í 2019 er sett ájavnt við 2018, tí úrslitini fyri 2019 eru ikki klár enn.**




**Mynd 3. Videoupptøkur av botninum á túri 1933.**




**Viðmerkingar:** Smálutir av ymsum slagi eru skrivaðir í Tur1932d.txt.